# ur hjá abba sínum Djóna í Geil

hjúnum báðum Jóhonnu og Petur Alberg, og tað gingu fimm ár, áðrenn Petur aftur fer at skriva dagbók, og tá var tað framvegis lítli Petur, sum var fremstur í huganum.



*Gravsteinurin hjá Jóhannu (1894-1965) og Petur Alberg (1885-1940) er tann lági steinurin høgrumegin á myndini. Vinstrumegin liggja Kristin (1877-1935) og Nicolina (1875-1936). Hetta er eitt vakurt dømi um samanhald, at teirra hvílustað á fold skuldi verða lið um lið. Tað er nógvir vakrir gravsteinar í kirkjugarðinum á Svínaryggi. Men hetta eru helst ein av teimum best hildnu gravunum*

## Djóni í Geil

Lítli Petur fór í somu grøv sum abbin Djóni og omman Betti. Tí skulu hesi bæði eisini umrøðast í hesi grein. Her skal aftur vendast aftur til tað, sum Petur Háberg hevur skrivað um ommubeiggjan í Hugbirtingum. Tað kann sigast, at Djóni hevur verið eitt einastandandi menniskja. Tað kundu verið skrivaðar bøkur um hann og hansara børn. Umframt tað, sum annars er skrivað, verður hann eisini nokk so væl lýstur í dagbókini hjá soninum Petur. Í seinasta parti av hansara dagbók fyri 1898 hevur Petur eina sera áhugaverda frásøgn um, tá ið tingið varð kallað saman við tí endamáli at gera nakað við bretsku ránsveiðina undir Føroyum, og her var Djóni ein av høvuðspersónunum aftanfyri.

Petur Háberg skrivar annars:

*Vit renna okkum á navnið Djóni í Geil alla møguliga staðni: Við kongavitjan, sum byggimeistara, bæði i gróti og timbri, sum arkitekt, sum málara, sum kirkjutænara, sum kommunustjórnarmann, sum sálina í fráhaldsrørsluni og í sjúkrakassastovnanini, sum løgtingsmann, sum mylnara, sum blómuelskara og urtagarðsmann.*

*Hann hevur ongan minnisvarða fingið, hóast hann mangar ferðir hevur hann uppibornan. Jú, gravsteinin hevur fráhaldsfólkið reist honum. Men tá ið tú fyri 30-40 árum síðani (hetta er skrivað um 1980) kom eitt sindu niðaná og hugdi yvir býin ein summardag, undraðist tú á, hvussu nógv av grønum leyvi, ið sást millum hini marglittu húsini á hesum karga jarðarbotni. Av sonnum eitt ómetaligt vakurt minni um Djóna í Geil, ið átti mesta partin av æruni fyri, at Havnarfólk fór undir at planta urtagarðar.*

Her kunnu vit eisini minna á, at kendi og vakri kvøldsámurin »Nú dagurin at enda er«, er yrktur av Djóna.

Djóni var sonur Poul í Geil, kallaður Poul Alting. Hetta tilnevni sigur eisini eitt sindur um pápan. Mamman var Anna, dóttir Andrass, sum bygdi Argir. Hon var søgd at vera so hittinorðað. Ein dagin hitti hon ein nólsoying, sum heilsaði henni: »Góðan morgun frú Alting.« Hon svaraði aftur: »Góðan morgun hr Ingenting.«



Betti var kona Djóna í Geil

Kona Djóna var Betti Holm, dóttur Kristin Holm. Hann var sonur prestin í Kvívik, Niels Lassen Holm. Betti segðist at vera so vøkur, lítil og kvinnulig.

## Kristin

Petur Háberg skrivaði millum annað um Kristin í Geil, son Djóna, sum vit í dag kanska mest minnast sum stovnara og blaðstjóra á Tingakrossi:

*Ta tíð, eg var smádrongur, havi eg sæð so ómetaliga nógv í Kristin í Geil, sum hevði so nógvar listarligar gávur, at tekna og mála – og kanska helst at skriva, yrkja, týða og skapa innanfyri sjónleik og bókmentir. Hann var barnavinur, djóravinur, framherji fyri øll kúgað, vildi upplýsing fyri fólkið, hataði alt hykl, alt kávalæti kundi hann kryvja heilt til mergjar.....*

*Ikki var hann at spæla við, tá ið hin fátæki leið órætt móti tí fína. Ein drongur var bøðilsbankaður, tí at hann hevði framt ein smávegis stuldur.*

*Ein danskir embætismaður átti ein son, sum var so"óheppin", at ein fínur lummaknívur datt niður í lumma hansara. Kristin frætti hetta og skrivaði um, hvussu hin fátæki var bøðilsbankaður, meðan embætismannasonurin slapp undan. Hvat hendi? Kristin var kravdur í Skansan at sita, tí hann hevði fornermað ein embætismann. Hann slapp tó við eini stórari bót, sum sjálvstýrisfelagar hansara hjálpti honum at gjalda. Hetta var standurin í Havn í farnu øld.*

Jú víst er søga í hesum gravsteinum. Vit hava longu havt frásganir um Petur Alberg sjálvan, og gera ikki meira burtur úr honum hesa ferð. Vit fara í seinni Miðvikum at greiða nærri frá hesum úrmælingum.



Jóhanna – Ólavsøkudag 1932



Djóni í Geil í Trýkantinum, sum var geirin niðan fyri amtmansgarðin, sum hann skapti til »den lille Perle nedenfor Amtmandshegnet – et Mindesmærke, der vidner om en dygtig og en god Mand.«



Petur Alberg í 1933